Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting: 25. februar 2021
Mál nr.: 16/01419
Málsviðgjørt: JN/HZH

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 20. desember 2017, verða gjørdar hesar broytingar:
	1. Í § 3 verða sum stk. 3 og 4 sett: "*Stk. 3.* Útbúgvingarstovnurin hevur eftirlit við, um tann lesandi er lestrarvirkin, og í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at tann lesandi er farin undir útbúgvingina, og hvørt hálvár eftir hetta, skal útbúgvingarstovnurin boða Studna frá, um tann lesandi er lestrarvirkin sambært stk. 1, 2. pkt. *Stk. 4.* Studni kann krevja stuðul rindaðan aftur, um tann lesandi hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella hevur tagt burtur týðandi upplýsingar ella ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars."

	2. Aftan á § 6 a verður sett: "**§ 6 b.** Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, at Studni kann veita studning til skúlagjald fyri næming, sum tekur lestrarfyrireikandi altjóða gymnasiala miðnámsútbúgving uttanlands, eftir at hava lokið fyrsta árið av gymnasialum miðnámi í Føroyum. *Stk. 2.* Studningur til skúlagjald fyri næmingin kann í mesta lagi verða veittur í 2 ár. **§ 6 c.** Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, at næmingur, sum tekur lestrarfyrireikandi gymnasiala miðnámsútbúgving, sum er skipað sum liður í norðurlendskum samstarvi, og sum partvís er staðsett uttan fyri Føroyar, verður javnsettur við næming, sum tekur miðnámsútbúgving í Føroyum."
Stk. 4. Studningur til einsamallar uppihaldarar verður veittur umsøkjara, ið er lestrarvirkin og fær serliga barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar sambært "løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 21. mai 2008" í ásettu lestrartíðini sbrt. § 18, stk. 1 og stk. 2. Studningurin til einsamalla uppihaldaran er kr. 1448 um mánaðin.	**3.** Í § 12, stk. 4 verður: ""løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 21. mai 2008"" broytt til: "løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl."
§ 13. Studningur til skúlagjald kann veitast umsøkjara, ið er fyltur 18 ár, og sum fer undir hægri lestur uttan fyri Norðurlond. Studni rindar studning til skúlagjaldið sambært rokning frá útbúgvingarstaðnum. Studningurin til skúlagjaldið er í mesta lagi kr. 80.000 um árið. Møguligur studningur til skúlagjaldið frá SU ella øðrum lestrarstuðulsstovni verður roknaður sum partur av nevndu upphædd. *Stk. 2.* Studni kann veita lesandi lán til írestandi skúlagjald, tó í mesta lagi kr. 80.000 um árið.	**4.** Í § 13, stk. 1, 3. pkt. og stk. 2 verður "kr. 80.000" broytt til: "kr. 100.000".
§ 21. Um lántakarin ikki lýkur lánitreytirnar ella letur vera við at gjalda falnar rentur og avdráttir, kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan.	**5.** Í § 21, stk. 2-4 verður: "Toll- og Skattstovu Føroya" broytt til "TAKS".

Stk. 2. Krøv sbr. stk. 1 kunnu verða innheintað og pantað av Toll- og Skattstovu Føroya. *Stk. 3.* Heimilað verður Toll- og Skattstovu Føroya at innkrevja skuld sbr. stk. 1 og 2 við at afturhalda í A-inntøku lántakarans smb. heimildunum hesum viðvíkjandi í Skattalógini. *Stk. 4.* Tey krøv sbr. stk. 1, ið ikki verða innheintað av Toll- og Skattstovu Føroya, kunnu innkrevjast av øðrum innkrevjingarstovni.	